
Starvsfólk hjá Statoil. Mynd: Øyvind Hagen, Statoil

# Statoil váttar størsta uppsagnarumfar í søgu felagsins

**Jógvan Hugo Gardar**

16.06.2015 - 07:25

Oljan.fo

Fríggjadagin skrivaðu vit at Statoil skal koyra 1500 starvsfólk heim. Harafturat skulu góð 500 sum hava avtalur við Statoil missa hesar avtalurnar. Keldan var Dagens Næringsliv.

Í morgun hevur Statoil alment boða frá at talið passar. Tilsamans millum 1100 og 1500 føst størv skulu burtur í ár og í 2016. Harafturat fara fólk sum eru leigaði inn til ymsar uppgávur at missa hesar uppgávurnar. Við hesum er váttað at talið á størvum sum hvørva í fyritøkuni er sæguliga stórt. Ongantíð áður hevur Statoil minkað so nógv um starvsfólkahópin.

Leiðslan í Statoil sigur at tey vóna at sleppa undan at koyra fólk, men at starvsfólkatalið kann minkast við at fólk fara frá vegna aldur ella fara av øðrum orsøkum. Hesi størv vera so ikki sett aftur.

Avtalan um sparingarnar hjá Statoil er gjørd millum leiðslu og fakfeløg, fyri at finna bestu loysnina í eini truplari tíð, verður sagt.

Statoil hevur síðani 2013 minkað um starvsfólkatalið við 1340 føstum størvum og 995 innleigaðum. Nú skulu so áleið líka nógv føst størv burtur, og 525 avtalur við innleigaði verða ikki longdar.

Statoil sigur at hendan sparingin er annað umfar í teirra ætlan at tilpassa Statoil til nýggjar tíðir. Statoil fór undir at gera broytingar í starvsfólkahópinum longu áðrenn oljuprísurin fór at lækka fyri einum ári síðani.